# Dómararnir skulu jolla sær

Fótbóltsdómarafelagið og Føroya Bjór skrivaðu fríggjadagin undir sponsorsáttmála fyri komandi kappingarár.

Hetta er næsta ferðin, at fótbóltsdómarar gera slíkan sáttmála. Fyrra ferðin var fyri tveimum árum síðani, tá LÍV gjørdist stuðul hjá dómarunum. Ætlandi skal nýggi sáttmálin eisini fevna um tvey ár, men í fyrstu atløgu fevnir undirskriftin so bara um hetta eina árið.

Tá dystir verða leiktir, verður tó ikki heilt so sjónligt, hvør er stuðul hjá dómarunum. Fótbóltsreglurnar siga, at tað bara er loyvt at hava lýsingar á ermuni á búnanum, og tí verður tað bert her, at jollylogo'ið sleppur framat á sjálvum dómarabúnanum. Hinvegin eru ongar ásetingar fyri, hvussu venjingarbúnin hjá dómarunum kann síggja út, og tí verður hetta helst meira sjónligt her.

-jm



*Petur Jacobsen og Eiler Rasmussen taka lógvatak, nú nýggjur sponsorsáttmáli er skrivaður*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Danmark sett upp á pláss

**Todi Jónsson var ikki við, tá ið FCK bara megnaði javnleik í Parkini ímóti Tromsø, og Brøndby tapti stórt í Göteborg**

ROYAL LIGAN

*Jóannes Hansen*

Tað hilnaðist illa hjá teimum fýra donsku feløgunum, tá ið tað í vikuskiftinum aftur gjørdist álvari. Talan var um fjórða av seks umførum í Royalu liguni.

FCK var á heimavølli í Parkini ímóti norska Tromsø. Uppgerðin var søgulig á tann hátt, at hetta var fyrsta ferðin yvirhøvur, at takið var á undir fótbóltsdysti, soleiðis at Parkin harvið varð størsta innandura høllin yvirhøvur í Danmark.

Úrslitið varð 2-2, eftir at Tromsø eitt skifti í 1. hálvleiki hevði verið frammanfyri við tveimum málum. Zuma og Álvaro Santos vóru í FCK álopinum, og teir skoraðu hvør sítt mál. Álvaro skoraði einasta málið í 2. hálvleiki við brotssparki. Hóast FCK í 28 minuttir spældi ellivu móti tíggju, so eydnaðist teimum ikki at skjóta sigursmálið.

Einki sást til Toda Jónsson. Hann var ikki við, tí hann hevði ein lítlan løst at dragast við.

– Talan er ikki um skaða av tí slagnum, sum so ofta og leingi hevur hildið mær burtur frá fótbóltinum. Eg fekk í vikuni ein lítlan vøddaskaða frammanfyri á lærinum, og tað varð hildið óneyðugt at taka nakrar kjansir, sigur Todi Jónsson á heimasíðuni hjá sær.

Næsti dysturin hjá FCK verður hóskvøldið, tá ið teir skulu spæla ímóti Brøndby. Um møguleikin at halda fram í kappingini framvegis skal vera veruleiki, so verður neyðugt við trimum stigum. So í hvussu so er annað felagið fer úr kappingini hóskvøldið.

Hjá Brøndby hilnaðist tað illa, tá ið teir sunnudagin vóru í Göteborg og spældu ímóti IFK. Úrslitið á tunga og óslætta vøllinum var 3-0 til heimaliðið, sum gjørdi øll málini undan nógva vindinum í 1. hálvleiki.

Halmstad vann á heimavølli 2-1 á OB, og í Tróndheimi vann Rosenborg 1-0 á Esbjerg. Í Malmø var eingin slingur í valsinum hjá heimaliðnum, sum vann 2-0 á Brann úr Bergen.

# Ov fáir hanga í

**Tað eru ov fáir dómarar, sum hava tol at bíða, til dystir í fyrstu deild gerast veruleiki, heldur Eiler Rasmussen**

FÓTBÓLTSDÓMARAR

*Jákup Mørk*

– Tað er einki at ivast í, at ein slíkur sáttmáli er týdningarmikil hjá okkum at fáa.

Soleiðis staðfesti næstformaðurin í fótbóltsdómarafelagnum, Eiler Rasmussen, eftir at felagið fríggjadagin hevði gjørt stuðulsavtalu við Føroya Bjór.

– Størsta uppgávan hjá okkum er, at arbeiða fyri verandi og nýggjum dómarum, og bara tann parturin í sjálvum sær fyllir ríkiliga nógv hjá okkum. Ikki minst, tí tað hjá so nógvum er nógv lættari at vera dómari uttan fyri vøllin, heldur enn inni á vøllinum, heldur hann speiskliga fyri.

– Tí er tað av alstórum týdningi, at vit fáa lætt so nógv sum gjørligt um umstøðurnar hjá dómarunum, og her eru búnar ein háttur.

## Ov stórt fráfall

Men tað eru ikki bara búnar, sum týdningarmiklir hjá felagnum. Hóast eingin verður upplýst, so gevur stuðulsavtalan sjálvandi eisini nakað av peningi, og teir eru eisini kærkomnir hjá dómarunum. Tí tiltøkini, sum eru í umbúna, eru nógv í tali.

– Vit royna støðugt at gera tað meira áhugavert at verða dómari. Stóri trupulleikin er helst tann, at tað er so stórur aldursmunur frá teimum rutineraðu dómarunum í bestu deildini og niður til okkum aðrar. Og tað ger, at rekruttering av nýggjum dómarum er altavgerandi í løtuni. Ikki minst, tí hesir kunnu læra eina rúgvu, um teir sleppa at arbeiða nøkur ár saman við teimum eldru dómarunum. Tað er eitt mál, sum eftir míni fatan hevur lágan prioritet hjá feløgunum, tí hugburðurin tykist ofta vera tann, at »dómararnir bara koma av sær sjálvum«.

– Vit hava so roynt at bøtt um hetta við at halda fyrireikandi skeið kring landið, og her hevur uppmøtingin eisini verið heilt hampulig, men trupulleikin er bara, at hóast fleiri eru til hesi skeið, og hóast fleiri taka dómaraprógv, so eru tað ov fáir, sum gerast dómarar, heldur hann.

Ikki minst heldur Eiler, at vantandi tol er ein trupulleiki í hesum.

– Tað eru ov nógvir dómarar, sum fella frá, tí teir ikki hava tol at bíða. Tað er nú einaferð so, at royndirnar eru at kalla altavgerandi, um tú skalt døma dyst í bestu deildini. Tí eru fyrstu árini sum dómari gjarna so, at dømt verður ein rúgva av dystum í triðju deild og í kvinnudeildini, og ikki fyrr enn eftir hetta, verður roynt at seta dómararnir við í hægru deildunum. Tað eru tað fleiri, sum ikki tíma at bíða eftir, og tað er helst ein orsøk til stóra fráfallið.

## Collina er dreymurin

Heilt svart er tað kanska ikki hjá annars svørtklæddu monnunum. Í øllum førum fegnast Eiler sjálvur um, at FSF tykist leggja stóra orku í at betra um dómarastøðuna, og talan er eisini um spennandi tiltøk, sum liggja fyri framman.

– Eitt, sum vit hava roynt, er at halda skeið av ymsum slag. Fyri nøkrum árum síðani var Peter Mikkelsen her uppi, og seinsta í hesum mánaðinum kemur so hollendski Van der Ende at halda skeið. Tað eru tiltøk, sum ikki vóru komin í lag uttan hjálp frá FSF, og vit eru fegnir um, at teir soleiðis hava stuðlað okkum.

Spurdur, hvørt talan eisini verður um aðrar navnframar dómarar, sum koma hendanvegin, sigur Eiler, at tað veit hann ikki við vissu enn, men at hetta er nakað, sum tað støðugt verður arbeitt við.

– Dreymurin er sjálvandi Collina, men higartil haldi eg kortini, at vit hava verið hepnir. Bæði Peter Mikkelsen og Van der Ende hava verið á heimstindinum í dómaraykinum, og tað kann bara inspirera, um slíkir menn koma hendanvegin, staðfestir hann.

## SUNSET KAPPINGIN – KVINNUR

| | dystir | v | j | t | mál | vu. mál | tapt munur | málstig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 2 | 2 | 0 | 0 | 527 | 312 | 215 | 17 |
| 2 Stjørnan | 1 | 1 | 0 | 0 | 385 | 290 | 95 | 15 |
| 3 Neistin | 2 | 1 | 0 | 1 | 445 | 356 | 89 | 12 |
| 4 Søljan | 2 | 2 | 0 | 0 | 429 | 368 | 61 | 12 |
| 5 VÍF | 1 | 0 | 0 | 1 | 350 | 351 | -1 | 5 |
| 6 StÍF | 2 | 0 | 0 | 2 | 359 | 426 | -67 | 5 |
| 7 Kyndil | 2 | 1 | 0 | 1 | 321 | 430 | -109 | 5 |
| 8 Tjaldur | 2 | 0 | 0 | 2 | 254 | 537 | -283 | 0 |

## ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN – MENN

| | dystir | v | j | t | mál | vu. mál | tapt munur | málstig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 5 | 4 | 0 | 1 | 445 | 400 | 45 | 16 |
| 2 Kyndil | 5 | 2 | 0 | 3 | 445 | 370 | 75 | 12 |
| 3 H71 | 5 | 2 | 0 | 3 | 436 | 441 | -5 | 9 |
| 4 KÍF | 5 | 2 | 1 | 2 | 378 | 406 | -28 | 9 |
| 5 StÍF | 5 | 2 | 2 | 1 | 395 | 427 | -32 | 9 |
| 6 Neistin | 5 | 1 | 1 | 3 | 414 | 469 | -55 | 6 |

## Máltindarnir

**Kvinnur:**

| | | |
|---|---|---|
| Daiva Tuomaite | VB | 162 (52) |
| Nicoleta Radu Hansen | Søljan | 161 (22) |
| Ioana Rápa | VÍF | 125 (30) |
| Simona Petersen | Neistin | 114 (29) |
| Lina Andriulyte | Søljan | 95 (13) |
| Randi Wardum | Kyndil | 91 (16) |
| Aukse Vysniaskaite | VB | 89 (4) |
| Rebekka Justinussen | StÍF | 85 (9) |
| Marjun Tróndarson | Neistin | 76 (16) |
| Sunfríð B. Jacobsen | StÍF | 76 (30) |
| Poula D. Olsen | StÍF | 70 |
| Rannvá Augustinussen | VB | 70 (1) |
| Heidi Maria Akselsen | Søljan | 70 (7) |
| Ása Dam á Neystabø | Neistin | 65 (2) |
| Katarina Stepanov | Stjørnan | 62 (7) |

**Menn:**

| | | |
|---|---|---|
| Halgir D. Olesen | H71 | 103 (13) |
| Ingi Olsen | VÍF | 99 (26) |
| Damir Oros | Neistin | 98 (18) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 91 (7) |
| Áki Mørk | Neistin | 80 (7) |
| Agnar Joensen | VÍF | 78 (6) |
| Leivur Justinussen | StÍF | 77 (14) |
| Piti Negru | H71 | 76 (5) |
| Regin Petersen | KÍF | 74 (5) |
| Høgni Klein | Kyndil | 70 (3) |
| Henrik Gerster | H71 | 68 (6) |
| Josef Abrahamsen | Kyndil | 67 (13) |
| Alexandur Johansen | StÍF | 64 (21) |
| Jakob Jónsson | Kyndil | 61 (2) |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 54 (7) |